


ENDAMÁL
Endamálið við skeiðnum er at kunna luttakararnar um nýggju barnaverndarlógina, og greiða frá, hvussu fosturforeldur kunnu bera seg at mótvegis fosturbørnum og foreldrum teirra.

SKEIÐSINNIHALD
Á skeiðnum verður ein stutt gjøgnumgongd av nýggju barnaverndarlógini, serliga við atliti at broytingunum, sum hava týdning fyri fosturforeldur.

Síðani verður greitt frá, hvussu móttøkan, samveran og skilnaðurin millum fosturforeldur og fosturbarn kunnu greiðast. Eisini verður komið inn á samstarvið millum fosturforeldur og biologisk foreldur.

UNDIRVÍSINGARHÁTTUR
Undirvísingin verður skipað sum fyrilestrar og bólkaarbeiði.

LUTTAKARAR
Skeiðið er ætlað øllum teimum, sum hava børn til fosturs.

TÍÐ
03. desember 2005 frá kl. 09.30 til 17.00.

STAÐUR
Hotel Føroyar, Tórshavn.

FREIST
Tilmeldingarfreistin er mikudagin 30. november 2005.

TILMELDING
Tilmelding á ad@lawfirm.fo
telefaks 31 62 25 ella telefon 21 24 97.

UNDIRVÍSARI
Ásvør Skaalum, sálarfrøðingur

Skeiðið er ókeypis.

**Barnaverndarstova Føroya**
R.C. Effersøesgøta 30
FO-100 Tórshavn

REPROZ

# Søkt verður eftir skrivara

Søkt verður eftir parttíðarskrivara til ELNEVNDINA at byrja tann 1. januar 2006.

Starvið umfatar at taka sær av dagliga virkseminum hjá nevndini, harundir málsviðgerð, at fyrireika fundir og annað arbeiði, sum er fevnt av arbeiðsøki hjá ELNEVNDINI.

Skrivarin útinnir arbeiði í felag við formannin.

Skrivarin skal hava eltøkniligan førleika.

Løn samb. avtalu.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til ELNEVNDINA, Reynagøta 24, Postboks 252, 110 Tórshavn og umsóknirnar skulu vera latnar inn í seinasta lagi tann 12. desember 2005.

Gjøllari upplýsingar fáast frá Bjartur Dalsgarð, formanni á tlf. 354000.

**ELNEVNDIN**

ELNEVNDIN er stovnur undir Vinnumálaráðnum, sum er sett sbrt. løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað. Arbeiðsøkið hjá nevndini eru tey verkevni, sum standast av løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað og løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarum við tilhoyrandi kunngerðum, harundir at hava eftirlit við rakstri av sterkstreymsútbúnaðinum og við eltilfari hjá innflytarum, heilsølumonnum og sølubúðum v.m.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi:**
**Hesir roknskapir fyri roknskaparárið 2003/2004 eru innkomnir áðrenn seinasta innlatingardag:**

**Sp/f 3709,**
Sp/f Berg Shipping Ltd.,
100 Tórshavn
**Sp/f 3692,**
Sp/f BK,
110 Tórshavn
**Sp/f 3697,**
Sp/f E Roknskapur,
110 Tórshavn
**P/F 3706,**
P/F Faroe Finance,
100 Tórshavn
**P/F 3670,**
P/F Faroe Seafood
Processing Hvalba,
850 Hvalba
**Sp/f 3702,**
Sp/f JakNai,
188 Hoyvík
**Sp/f 3653,**
Sp/f JPS,
627 Lambi
**P/F 3682,**
P/F SeWave,
210 Sandur
**P/F 3704,**
P/F Suðuraling,
900 Vágur
**P/F 3655,**
P/F 09.09.2003.,
410 Kollafjørður

*Skráseting Føroya*
*tann 16. november 2005*
*Kristin Balle*

TVØROYRAR KOMMUNA

**Orsaka av, at ov fáar umsóknir komu, verður hervið niðan fyri nevnda starv lýst leyst av nýggjum**

# Leiðari til nýggju Barnaverndarumsitingina

**Í Suðuroy og Sosialu deild í Tvøroyrar kommunu.**

**Førleikakrøv:**
Vit ímynda okkum at best skikkaðu umsøkjararnir hava annaðhvørt:
- Kandidatútbúgving frá hægru lærustovni innan løgfrøði, stjórnmálafrøði og sambæriliga fyrisitingarfrøðiliga útbúgving
- Hollan fyrisitingarrættarligan kunnleika og royndir
- Sosialfakligar royndir
- Royndir av fyrisitingarligari málsviðgerð, herundir royndir av at málsviðgera persónsmál
- Leiðsluroyndir ella royndir av at samskipa størri verkætlanir

**Ella**
- Sosialráðgevaraútbúgving og royndir
- Viðkomandi leiðsluroyndir ella viðkomandi omanáútbúgving/dupultútbúgving
- Leiðsluroyndir ella royndir av at samskipa størri verkætlanir
- Royndir av arbeiði við barnaverndarmálum
- Kunnleika til fyrisitingarrætt

Rætti umsøkjarin kann tó eisini hugsast at hava aðra í minsta lagi miðallanga útbúgving innan skúla-, almanna- ella heilsuøkið og viðkomandi royndir.

**Starvið**
Ætlanin er, at starvsøkið skal vera hálva tíð sum leiðari fyri barnaverndarumsitingina, og hálva tíð sum leiðari á sosialu deildini, men fyrstu mánaðirnar skal tú nýta alla tína orku til barnaverndarpartin.

Kommunurnar hava funnið saman um barnaverndarøkið, og vit vilja meira enn bert at lúka minstukrøvini í barnaverndarlógini: vit vilja skapa eina veruliga, góða og vælvirkandi barnaverndartænastu, sum leggur stóran dent á fyribyrgjandi barnaverndararbeiðið. Tú skalt saman við barnaverndarnevndini vera høvuðsdrívmegin í at menna nýggja tænastuna, og skal tí tola broytingar. Men tú fært eisini ein einastandandi møguleika at vera við til at gera av hvørjar broytingar verða.

Kommunurnar hava harafturat sett sær fyri at arbeiða skjótt fram móti at gera eina felags sosiala deild fyri oynna. Vit hava stórar ætlanir fyri deildini. Tú skalt virka við í fyrireikinginum, og byggja deildina upp, tá endaliga avgerðin er tikin.

Vit tú vita meira um starvið, so les starvsfólkaprofilin http://www.tvoroyri.fo ella http://www.vagur.fo/ ella ring til Jens Johannesen, formann í sosialu nevnd tlf. 371770.

**Deildin** verður í fyrsta umfari mannað við einum leiðara, sum saman við samstarvsnevndini setir starvsfólk afturat, sum tørvurin verður.

**Løn- og setanarviðskifti** verða eftir útbúgving tíni, annaðkvørt eftir sáttmála millum Kommunala arbeiðsgevarafelagið og avvarðandi yrkisfelag, ella - um KAF ikki hevur sáttmála við avvarðandi felag - við støði í sáttmála millum avvarandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Starvið kann verða áramálsett og verður sett sum skjótast.

**Umsóknir** skulu vera á skrivstovuni hjá Tvøroyar kommunu í seinasta lagi fríggjadagin hin 9. desember klokkan 15.00.

**Tvøroyrar kommuna**

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við